VB-StÍF 18-23 (11-11):

Skerdir meistarar taptu

Uttan útlendska stuðulin megnaði VB ikki at halda fast í StÍF, sum seinasta korterið avgjørdi dystin til egnan fyrimun

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Sterka bak-ketan hjá StÍF gav alla tíðina VB trupulleikar, og var eisini viðvirkandi til, at heimaliðið ikki fekk glið á kontra-spælið

Mynd: Áki Bertholdsen

Sum tað framgongur aðrastaðni í blaðnum, so var upptaktin til dystin um vikuskiftið ikki tann besta hjá VB-kvinnunum. Óvissa um rættin hjá útlendsku leikarunum at taka lut í dystinum høvdu við sær, at Aukse Vysniaskaite og Asta Armonavicuite als ikki komu upp í hópin. Hartil er Daiva Toumaite framvegis ikki før fyri at spæla, og so mátti álitið setast á lokalu leikararnar. Eisini her var VB tó skert, tí Gurið Mortensen var valla meira enn hálv, tá hon við hovnum fóti steig inn á vøllin.

Sterk bakketa

Fittan tein av dystinum røktist kortini fyri, at VB kundi fáa nakað burturúr. Kontraálopini riggaðu kanska ikki so væl, sum tey oftani áður hava gjørt, men heimaliðið megnaði fyri tað mesta at halda fast um leiðsluna í dystinum.

Tað stóð tó eisini alla tíðina greitt, at um VB skuldi fáa stigini, so varð tað ikki uttan svørðslag. Sterka og vælvaksna bakketan hjá StÍF megnaði alla tíðina at leggja trýst á VB-málið, og fyri tað nógva sótu skotini eisini soleiðis, sum tey eiga. Alina Olaru var ikki við á liðnum hjá StÍF, men í hennara stað traðkaði Sunfríð B. Jacobsen til, og sum støðug skothóttan lá hennara partur í dystinum so avgjørt ikki eftir.

Tað gekk soleiðis leingi javnt á, men um miðjan seinna hálvleik tók tó at skrædna millum liðini. VB megnaði ikki at gagnnýta yvirtalsstøðu, tá tær leiktu seks móti fimm, og tá StÍF aftur var fullmannað, var tað sum heimaliðið gav skarvin yvir. Næstu tíggju minuttirnar vunnu gestirnir 5-1, og so stóð á hjá VB. Eitt tiltrongt time-out gav ikki neyðugu úrtøkuna, tá StÍF kortini helt á fram við sínum bumbuálopum, og seinastu løtuna stóð veruleikin greitt málaður í VB-høllini. VB hevði tapt fyrsta heimadystin í meira enn eitt álmanakkaár, og við hesum høvdu tær eisini mist takið í oddinum, har VÍF nú er einsamalt á odda.

Spenningurin økist

Hóast umstøðurnar kring mista oddasessin hjá VB sjálvsagt ikki eru av slagnum, sum søma ítróttarandanum, so er tað fyri spenningin í kappingini hugagott at staðfesta, at tað enn eru eini fýra-fimm lið, sum hanga fast í oddinum, nú fyrsti fjórðingurin av kappingarárinum er um at fara aftur um bak.

Og fyri strandingar man tað kennast hugagott, at teirra lið er eitt av teimum, sum enn hongur í. Hóast liðið í tali av útlendingum er viknað í mun til árið í fjør, so tykjast tær heimligu framvegis at vaksa við uppgávuni, og so er spurningurin, hvørt hetta eisini er støðan, tá tær um eina viku skulu takast móti Neistanum.

VB fer tá til Vestmanna í einum dysti, sum í løtuni líkist væl meira enn »bert« einum oddabraki. Sum landið liggur í løtuni, so halda tey í Vági seg í øllum førum hava nakað at hevna í hesari uppgerðini. Hvørt tað so verður við ella uttan útlendingar, fer tíðin at vísa, men í øllum førum skal VÍF neyvan rokna við nøkrum løttum stigum, skilst.

Dysturin í tølum

VB-StÍF 18-23 (11-11)

Málskjúttar
VB: Gurið Mortensen 9(5), Rannvá Augustinussen 4, Eyðbritt Krosslá 2, Margreth Augustinussen 2, Eydis Kjærbo 1
StÍF: Sunfríð B. Jacobsen 9(2), Paula B. Høgnesen 5, Milica Ergic 4(2), Beinta Joensen 2, Poula D. Olsen 2, Anna B. Danielsen
Brotskøst: VB 5, StÍF 5
Útvísingar: VB 2, StÍF 3
Dómarar úr Kyndli: Geir Wardum & Gunnar Gregoriusen

Stjørnan-Søljan 34-17 (17-7):

Enn ein staðfesting

Risastóra gloppið millum topp og botn í kvinnudeildini varð aftur staðfest, tá Søljan vitjaði í Klaksvík

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tað var alla tíðina greitt, at stigini skuldu vera í Klaksvík, tá Søljan var á vitjan sunnudagin. Munurin millum ovaru og niðaru liðini á stigatalvuni er stórur í føroyskum kvinnuhondbólti, og fólkatrot hjá Søljuni gjørdi ikki støðuna betri í so máta. Hesa ferð var støðan somikið álvarslig, at Kristina Griksaite, sum annars telist millum bestu málverjarnir í landinum, mátti leika sum útispælari, og á heimaliðnum lótu tær ikki boðini liggja á.

Frá fyrsta bríksli lupu tær avstað, og tó at tær helst kundu gjørt sær meira ómak við avrikinum, so byrjaði eit stórt glopp at opna seg fyri alt fyri eitt. Spurningurin var einamest, hvussu stórur munnurin skuldi gerast, og tá alt kom til alt, so gjørdist talan um tvey fyri eitt hjá Stjørnuni.

Fyri Stjørnuna mundi dysturin sum so ikki telja sum stórt annað enn upphiting til komandi dysti móti Neistanum. Hesin verður longu týskvøldið, og fær Stjørnan eisini fult í teirri uppgerðini, fer oddurin mest sum at skræða seg leysan.

Søljan skal í dyst aftur mikudagin, tá Kyndil kemur á vitjan. Hetta líkist fyrst og fremst einum dysti um, hvat liðið skal hanga einsamalt í botninum, og so er spurningurin, hvussu tað fer at tørna út.

Dysturin í tølum

Stjørnan-Søljan 34-17 (17-7)

Málskjúttar
Stjørnan: Katarina Stepanovic 7(2), Anna Kristina Samson 7, Annika Ljóstein 7(2), Bára S. Klakstein 4, Joan M. Djordjevic 4, Súsanna Jacobsen 3, Jastrid Gullaksen 1, Una Olsen 1
Søljan: Nicoleta Radu 6(1), Heidi Maria Akselsen 4, Kristina Griksaite 4, Jana Jacobsen 1, Katrin Jørgensen 1, Heidi Haraldsen 1
Brotskøst: Stjørnan 5, Søljan 2
Útvísingar: Stjørnan 1, Søljan 6
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trygvi Mortensen

Martin í Budapest

Føroyameistarin úr Havn er í hesum døgum í Ungarn har hann luttekur í einari IM-kapping

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Tað eydnaðist ikki hjá Martini Poulsen at vinna sær ein IM-norm í hesum umfarinum

19 ára gamli Martin Poulsen hevur ætlanir um at telva nakrar kappingar á evropeiska meginlandinum innan jól. Í Budapest legði hann frá landi. Í kappingini, sum er nevnd First Saturday, eru ellivu luttakarar, fimm altjóða meistarar og tíggju umfør. John Arni Nilssen fekk sín næsta IM-norm í júst somu kapping í august.

Átta umfør eru leikt og Martin hevur 4,5 stig. Miðalmótstøðan hjá Martini er 2260. Tískil liggur føroyingurin higartil eitt lítið vet omanfyri sína væntaðu skoru, men normmøguleikin er tó farin. Kravið var nevnliga 7 stig av 9, ella 7,5 av 10. Vinnur Martin síni seinastu tvey talv, endar hann eitt stig frá norminum.

Telvingin hjá havnarmanninum hevur verið heldur óstøðug. Hann hevur í eyðkendum stíli telvað kompromileyst, sum hevur viðført fýra góðir sigrar, men eisini trý tap og ein javnleik. Tá trý umfør vóru leikt, hevði Martin eitt stig. Hann reisti seg tó og vann í fjórða og fimta umfarinum. Í sætta umfari brast norm vónin tá hann mátti lúta, men í sjeynda og áttanda umfari vann hann og leikti javnt.

Úrtøkan hjá Martini móti teimum fimm IM´arunum, sum hann longu hevur hitt, er tvey stig. Seinastu tvey talvini í kappingini verða móti javnt sterkari mótstøðu. Martin liggur á einum deildum triðja plássi nú kappingin av álvara er farin at líða móti endanum.

Sokolov og Nikolic í Íslandi

Eins og í fjør í 1st Selfoss Milk Tournament, deildu Ivan Sokolov (2695) og Predrag Nikolic (2647) fyrsta plássið millum sín í 2nd Selfoss Milk Tournament. Talvfelagið Hrókurinn, sum eitt nú Flóvin Tór Næs og Rógvi W. Rasmussen seinastu árini hava leikt við, skipar fyri. Sokolov er eisini á limalistanum hjá Hróki.

Kappingin í ár varð rættiliga jøvn í toppinum. Nikolic hevði leiðsluna heilt fram til sjeynda umfar, tá Sokolov tók hann aftur. Eisini russin Malakhov (2696) fylgdi væl við, og endaði bert hálvt stig aftan fyri vinnarnar.

Sokolov og Nikolic fingu sjey stig av níggju, meðan Malakhov fekk hálvtsjeynda stig. Ein stór succes hjá føroyavinunum báðum, og eftir hendan kappingarsigur hevur Sokolov omanfyri 2700 í rating!

Umgdómskapping í Gøtu

Leygardagin varð fyrsta ungdómskappingin í heyst telvað í Gøtu skúla. Í elsta bólkinum, fødd 1987-88, vórðu tveir vinnarar, Heri Thomsen úr Gøtu og Rógvi Mortensen úr Havn. Henry Berg úr Havn varð tann triði í røðini.

Í aldursbólkinum 1989-90 vórðu eisini tveir vinnarar, Rógvi Dragaberg úr Klaksvík og Helgi D. Ziska úr Havn. Berint Kalsø úr Klaksvík bleiv nr. 3.

Í næstyngsta bólkinum, 1991-92, endaði Rógvi E. Nielsen úr Sandavági langt fremstur. Fýra telvarar deildu annað plássið; Margar Berg, Høgni Svabo, Eilif Arge og Regin Sivertsen.

Í yngsta bólkinum, fødd í 1993 ella seinni, vann Olaf R. Samuelsen. Heiðrikur Jacobsen varð nr 2, meðan Rúni og Johann Vørmadal deildu triðja plássið.

93 børn luttóku. Onnur kappingin í røðini verður í Havn 15. november meðan finalukappingin verður 29. november, somuleiðis í Havn. Kappingarnar eru beinleiðis úttøkukappingar til NM fyri unglingar, sum verður í Svøriki komandi ár.

Talvið hesa vikuna

Martin Poulsen (2252) — IM Sandor Farago (2333)

First Saturday IM Budapest (1), 01.11.2003

1.d4 d5 2.c4 c6 (slavisk byrjan) **3.Ric3 Rif6 4.cxd5 cxd5 5.Bf4 a6 6.Rif3 Ric6 7.e3 b5 8.Rie5 Bb7 9.Be2 e6 10.0—0 Bd6 11.Rixc6 Bxc6 12.Bxd6 Fxd6** (Rættiliga jøvn og balanserað støða) **13.f4 0—0 14.Bd3 g6 15.Fe2 Rie4 16.Rfc1 f6 17.Bxe4 dxe4 18.Fc2! f5 19.Ria4!** (Við seinastu tveimum leikunum hevur Martin leikt seg til fyrimun) **19...Bd5 20.Fc5 Fxc5 21.Rixc5 Ra7 22.Rib3?** (Tykist heldur meiningsleyst. T.d a3, Rc3 og Rac1 sá gott út, styrkja seg á c-línjuni) **22...a5 23.Kf2 a4 24.Rid2 Rff7 25.Rc5 Rfb7 26.Ke1 Kg7 27.Kd1 g5 28.fxg5 Kg6 29.Rib1 b4** (Hvítur hevur mist fyrimunin, støðan er jøvn) **30.Rid2 Kxg5 31.Ric4 Kh5** (Møguliga átti svartur at farið út í rókaendatalvið, við at býtt bispin av við riddaran) **32.Kd2 Rg7 33.g3 Rac7 34.Rxc7 Rxc7 35.Rie5 Kg5 36.a3 bxa3 37.bxa3 Rb7 38.Rc1 h5 39.Rc8 Rb2+ 40.Rc2 Rb3 41.Rc3 Rb8** (Ikki er nógv at fara eftir í støðuni, svartur átti kanska at tikið til takkar við javnleiki. Martin bjóðaði umleið í hesari støðu javnleik, men altjóða meistarin vildi meira...) **42.Rc7 h4 43.gxh4+**

43...Kxh4?? (Ótrúligur feilur. Nú verður ungarski telvarin mátaður. 43...Kh6 var einasti leikur) **44.Rh7+ Kg5 45.h4+ Kf6 46.Rf7# skák og mát 1—0**